# CARPE DIEM

## *Hugvísindir og teirra leiklutur í einum nútíðar skúlaverki*

**Fyrilestur eftir**
**HANUS KAMBAN**

FYRRI PARTUR

### Dead Poets´ Society

Tá ið eg bleiv biðin um at bera fram nakrar hugleiðingar fyri tykkum, sum fara undir lesnað á Studentaskúlanum, kom eg at hugsa um tvey ting: ein film og eitt fimti ára minni. Filmin munnu summi av tykkum kenna, kanska hevur onkur eisini sæð hann. Hann hevur heitið *Dead Poets´ Society*, og høvuðsleiklutin hevur tann kendi sjónleikarin Robin Williams.

Filmurin er um ein lærara, John Keating, sum kemur til studentaskúlan Welton, sum er ein kostskúli, har bara dreingir ganga, og ber inn í henda stirvna, uppsteðgaða, autoritera skúla eitt frískt lot av nýhugsan. Keating, sum undirvísir í enskum bókmentum, leggur seg serliga eftir at vísa, at skaldskapur er viðkomandi, kann hava týdning fyri eins persónliga lív og kann broyta verðina. Hann vísir m.a. til eina yrking eftir tann rómverska yrkjaran Horats (65-8 f. Kristi føðing), har m.a. hesi orð koma fyri:

*Meðan vit tosa, er tann*
*øvundsjúka tíðin*
*flogin framvið. Heysta dagin og*
*goym so*
*so lítið sum møguligt til*
*í morgin.*

### Føroya Studentaskúli

Og hesi bæði orðini *heysta dagin* ella á latíni

*carpe diem*

verða til orðatak hjá næmingunum hjá Keating. Tey fari eg at venda aftur til.

So er tað fimti ára minnið. Tað er sjálvandi tann bera tilvild, at eg sjálvur fyri akkurát eini hálvari øld síðani byrjaði í hesum sama skúla, har tit nú sita. Skúlin helt tá til niðri í Havnini, í einum bygningi ikki langt frá Skansanum. Hann hevði tá 19 ár á baki, og vit høvdu tað privilegium at hava sum lærarar teir tríggjar, sum í 1937 stovnaðu henda skúla, eiðismannin Thomas Nygaard, elduvíkingin Christian Haraldsen og fuglfirðingin Erik Petersen.

### Hugvísindir

Ein filmur og eitt minni. Nú kunnu vit kanska tvinna hesi tingini saman og spyrja: Líkjast hesir báðir skúlarnir, tann veruligi, har eg gekk, og filmsins dreymaskúli? Og var kanska nakar John Keating (ella Robin Williams) á tí skúla, har vit gingu fyri hálvari øld síðani?

Upp á tann seinna spurningin er svarið nei. Upp á tann fyrra er svarið helst bæði ja og nei. Studentaskúlin var sjálvandi ikki ein kostskúli, og har gingu tíbetur næmingar frá báðum kynum. Og hóast vit tíverri tá ikki høvdu nakran John Keating á skúlanum, so høvdu teir tríggir lærararnir, sum stovnaðu Føroya Preliminer- og Studentaskeið (sum skúlin tá æt) tað í felag, at teir bygdu á eitt humanistiskt ella hugvísindaligt grundarlag, og at bókmentir, mál, søga og skaldskapur vóru ein natúrligur og samrunnin partur av teirra andaliga universi.

### Nyttuhugtakið

Spurningurin er nú: Hava vit brúk fyri eini slíkari humanistiskari siðvenju í dag? Ella eiga vit kanska at sleppa henni og avmarka okkum til eitt univers, har nyttuhugtakið og bara tað valdar? Vit eru samd um, hugsi eg, at vit hava brúk fyri verkfrøðingum, læknum, løgfrøðingum, grannskoðarum, sjúkrasystrum, teldusnillingum, matematikarum, alisfrøðingum, skiparum osfr. Men hava vit brúk fyri skaldskapi og bókmentum, søguligari vitan og málkunnleika?



*Robin Williams hevði høvuðsleiklutin í filminum Dead Poets´ Society*

Sum svar upp á henda spurning fari eg fyri fyrst at leita aftur í míni egnu barnaár. Tíðin, eg vaks upp í, var á mangan hátt øðrvísi enn í dag, men kortini ikki øðrvísi enn so, at orðini eisini tá vóru partur av eins uppvøkstri. Í skúlanum lærdu vit sálmar og føroyskar sangir. Í kirkjuni sungu vit danskar sálmar, tí tá var eingin føroysk sálmabók. Í mínum egna heimi hoyrdu vit ævintýr, søgur, sagnir og kvæðir. Føroyskur dansur og kvøðing vóru tá ein natúrligur partur av tilveruni, fyrst og fremst á vetri.

### Dansur og kvøðing

Og her kann eg nevna, at ein longu sum smádrongur ansaði eftir, at dansur og kvøðing kundu hava eina broyting við sær, sum rein við tey, sum vóru við. Gerandisdagurin kundi vera stríggin, eintáttaður, gráur, og hann kundi eisini meira enn so vera merktur av deilan, illstøðu ella grannaklandri. Men so, tá ið brúdleyp var ella dansikvøld, tóku fólk hendur saman, tróðu dansin og sungu ella kvóðu:

*Nú lystir meg í dansin at gá,*
*meðan rósur og liljur tær grógva*
*væl.*

Hvat var tað, sum her hendi? Vanliga tosaðu fólk um seyð, fisk, fugl, um streym, um politikk, um vøruprísir ella um hoyggj. Og nú sungu hesi somu fólk um rósur og liljur. Tey tóktust eisini vera eitt sindur broytt, vóru fattari enn vant, blíðari, smíltust, og summi vóru næstan ovfarakát.

Hóast ein tá illa dugdi at seta orð á broytingina, so var tað ikki torført, heldur ikki hjá einum barni, at skilja, at menniskjan, sum vanliga ferðast í tí heimi, har arbeitt verður, har trætumál verða loyst, fiskur veiddur ella sjúkur grøddar, viðhvørt hevur brúk fyri at sleppa úr hesum heimi og flyta seg upp á eina rók longri uppi, har sungið verður, og har skaldskapur ella tónleikur ella list eru á lofti.

### Rósan og liljan

Men hví er brúk fyri hesum skifti ella hesi metamorfosu? Latið okkum hyggja eina ferð aftrat at hesum vísuniðurlagnum. Ein hýsa er ein hýsa, og ein gás er ein gás. Men hvussu við eini rósu? Ella eini lilju? Tann skotski yrkjarin Robert Burns tekur soleiðis til:

*O, my luve is like a red, red rose,*
*That´s newly sprung in June,*
*O, my luve is like a melody,*
*That´s sweetly play´d in tune.*

Um liljuna sigur ein annar yrkjari, hesa ferð ein føringur, hann eitur J.H.O. Djurhuus:

*Hví stúrir tú hjarta mót vári,*
*tá ið sól prýðir blómprýddan*
*heim,*
*og gentan við rósum í hári*
*sæl droymir um lukku og gleim.*

*Tað er tí eg hoyri lilju*
*teska so kvøldsligt eitt ljóð:*
*Sjá fagrast eg eri av blómum,*
*men líkbleik og køld eins og snjó.*

### Heysta dagin

Við øðrum orðum: meðan gerandisdagsins orð vanliga (men ikki altíð, og tað er ein onnur søga)



*Føroya Studentaskúli helt árini 1946-62 til í VBV-húsunum, ovast miðskeiðis á myndini*